

# Samrøðulesing

## Saman skapa vit lesiløtuna



**Ein vegleiðing við støði í myndabókini Tóra og Sigga og Sára eftir Marie Norin og Emmu Adbåge.**

## Góðu lesarar

Ja, bæði tú, sum lesur fyri barninum, og barnið sjálvt – saman skapa tit lesiløtuna, og tað rópa vit *samrøðulesing*. Samrøðulesing snýr seg um, at bæði barn og lesari eru virkin í upplestrinum. Hesin hátturin styrkir málførleikarnar, tí at barnið luttekur í samskiftinum um bókina, bæði um myndirnar, tekstin og orðini. Endamálið við samrøðulesing er, at barnið er virkið í lesingini og luttekur saman við upplesaranum. Vit kunnu eisini lesa fyri teimum heilt smáu børnunum. Í fyrstuni sigur barnið kanska bara einstøk ljóð ella orð, men saman kunnu vit skapa eina støðu, har barnið brúkar málið meira og meira. Tað er soleiðis, vit læra mál: Meðan vit lurta og tosa saman.

Hvørja bók skulu vit lesa? Tað er ikki altíð lætt at siga, hvørjar bøkur hóska til hvørt einstakt barn, og tað er heldur ikki altíð lætt at siga, júst til hvønn aldur bókin hóskar seg, tí tað, sum hevur størstan týdning, er, at júst tað barnið tú lesur fyri, hevur áhuga í hesum, og at bókin er á tí støðinum, sum barnið er málsliga. Tað vil siga, at um flestu orðini, barnið sigur, eru støk orð, og barnið enn ikki tosar í longum setningum, so hóska myndabøkur sum *Heima hjá okkum, Fyrstu orðini* og *Litir* við einstøkum myndum seg væl. Er barnið farið at tosa í einføldum setningum, so hóska bøkur sum *Diddan er ill, Lóa og Lávus* seg væl, tí í teimum bókunum eru myndir, einfaldir setningar og frásøgn, sum barnið kennir seg aftur í. Tá barnið er farið at tosa í longri setningum og megnar at greiða frá hendingum, er gott at lesa bøkur við søgugongd og longri teksti sum t.d. *Pippi, Skrímslini* og bøkurnar um *Álv Ákason*. Børn mennast ymiskt, og tí hevur tað týdning at velja bókina partvíst eftir málsliga førleikanum og serliga eftir áhuganum hjá barninum. Tað ber eisini til at laga sjálvan tekstin og samskiftið til barnið, meðan tit lesa, tí lesivirksemi, sum verður lýst í næstu brotunum, eigur at verða lagað eftir einstaka barninum.




Hendan bókin eitur ***Tóra og Sigga og Sára*** og er ætlað børnum, sum eru umleið 3-6 ár. Í hesum brotinum eru góð ráð um, hvussu vit kunnu bera okkum at, soleiðis at børnini luttaka í upplestrinum.

> ***Dømi:*** Vit kunnu byrja, longu áðrenn lesingin fer í gongd og vísa barninum permuna á bókini og spyrja barnið: *hvat heldur tú, at bókin fer at snúgva seg um?* Og so eggja barninum at ímynda sær, hvat bókin snýr seg um. Á hendan hátt aktivera vit ta vitan, barnið longu hevur um evnið, og tað lættir um samskiftið.



Bókin snýr seg um vinir og upplivingar í barnagarðinum. Tað, sum er mest umráðandi, er at fáa børnini sjálvi at seta orð á hugtøk, upplivingar og kenslur og á hendan hátt brúka málið. Hetta kann mann gera við at hyggja at myndunum og tosa um tekstin.

***Dømi:*** Á síðu 13 og 15 sæst, at Sigga er kedd. Spyr t.d. barnið: Hvussu sær mann, at onkur er keddur? Hvussu sært tú út, tá tú ert kedd/ur? Minnist tú onkra støðu, tá tú var kedd/ur? Veitst tú, hví tú vart kedd/ur tá?

Tá tú lesur, er gott at minnast til at geva barninum stundir at svara og víðka um tað, sum barnið sigur, tað er at leggja vitan aftrat. Gott er at byrja við løttum spurningum, sum kunnu svarast við *ja* ella *nei*, fylg áhuganum hjá barninum og tosa eisini um ymiskt, sum barnið er upptikið av, og ger tað virkið.

***Dømi:*** Um barnið sigur: *Tóra sigur spinat*, so kanst tú siga: *ja, dámar tær spinat? Spinat er grønt*. Tit kunnu eisini tosa um *spinat og spagat, rímar tað?* Tosa eisini um, hvat hesi orðini merkja. Steðga á við onnur orð og vendingar í bókini sum t.d. *niður eftir bakinum, syngja sum ein eingil, gongur alt samalt yvir, beinini eru tung sum sandsekkir*. Tosa um týdningin av orðunum, og tit kunnu eisini tekna orðini.



Rætta ikki barnið, men endurtak orðini ella setningin á rættan hátt. Stuðla og eggja barninum at luttaka í lesivirkseminum. Tosa t.d. um, um barnið onkuntíð hevur flættur sum Sára og Heini á síðu 14, ella um barnið hevur fingið nýggjar vinir í barnagarðinum, og knýt á hendan hátt í ymiskt, sum barnið kennist við frammanundan. Spyr færri faktaspurningar og spurningar, sum kunnu kallast „eftirlitsspurningar", har tað bara er *eitt* rætt svar. Gev tær stundir at steðga á og lurta eftir svarinum hjá barninum. Lat barnið sleppa framat; ætlanin er jú, at tað er ein *sam*røða, so lurta eftir svarinum hjá barninum. Tosa saman um søguna, evnini, myndirnar og tvístøðurnar í bókini.

***Dømi:*** Hygg at myndini á síðu 20 og 21 og spyr ein opnan spurning um, hvat barnið sær. Við støði í tí, sum barnið svarar, spyrt tú spurningar um dreymar ella monstur.





Hesi hugskotini og hátturin at lesa uppá kann nýtast í nógvum øðrum bókum, og hetta er bara íblástur til, hvussu vit kunnu lesa við børnum.





*Tekstur: Sissal M. Rasmussen, ph.d. og adjunktur á Fróðskaparsetrinum*
*Útgáva: Tóra og Sigga og Sára eftir Marie Norin og Emma Adbåge, Bókadeild Føroya Lærarafelags, 2025*
*Samrøðulesing, vegleiðing, Sissal M. Rasmussen, ph.d. og adjunktur, Føroyar lesa, 2025*

